# Jákup er tøkur



Jákup á Borg noyddist skaddur av vøllinum, tá B36 um vikuskiftið vann 5-4 á EB/Streymi. Eftir dystin óttaðist spælarin, at hann nú noyddist at geva avboð til landsdystin móti Eysturríki, men so galið verður tað neyvan. – Eg var hjá Klæminti Isaksen, fysioteraputi, í gjár, og talan tykist ikki vera um veruligan vøddaskaða. Har er okkurt, sum argar eitt sindur, og eg venji ikki mikudagin, men hósdagin verið eg nokk partur av venjingini, og eg rokni við at vera tøkur leygardagin, sigur Jákup á Borg við portalin.

# Dýr Føroya-ferð

Tað er ikki bara hjá føroyska kringvarpinum, at hugsað verður um sparingar í løtuni. Úr Eysturríki ljóðar, at ferðin til Føroya er somikið dýr, at sjónvarpsfelagið, ORF, sum sendir dystin, bert sendir tann eina frásøgumannin til Føroya. Viðmerkingar um spælið, analysir og annað verður síðani gjørt úr studio í Wien, og hetta er nakað, sum eysturríkarar als ikki eru vanir við.




*Andreas Herzog er í dag ovasti í landsliðsleguni hjá Eysturríki. Formliga heitið á starvi hansara er team manager*

*Mynd: Polfoto/AP*

# Tapið nívur framvegis

**- Hatta var mín fyrsti og størsti váti vøttur á landsliðnum, sigur Andreas Herzog, sum spældi á eysturríkska miðvøllinum í 1990. Í dag er hann hjálparvenjari hjá landsliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk umsett frá APA*
*jakup@sosialurin.fo*

Dysturin hjá Føroyum móti Eysturríki var fyrsta royndin hjá Føroyum í altjóða undankapping, og Herzog sigur, at teir valla tímdu at taka uppgávuna í álvara.

- Vit hugsaðu, at um vit spældu væl, so vunnu vit 10-0. Spældu vit illa, so vunnu vit 3-0. So tú kanst siga, at vit raknaðu við, meðan dysturin varð spældur, sigur Herzog um dystin, har timbursølumaðurin úr Sandavági, Torkil Nielsen, eftir 61 minuttum gjørdist tjóðarhetja.

Fram til hetta hevði eysturríkska liðið nakrar góðar møguleikar, men teir vórðu allir skammiliga misnýttir. Ikki minst av stóru stjørnuni, Toni Polster.

- Eg minnist eg tosaði við hann undir dystinum. Eg segði »Toni, nú mugu vit fáa gongd á«. Einasta svarið, sum hann gav mær, var »Herzal (lítli Herzog, blðm.), tak tað nú róligt«.

- Tað var hart. Fólk flentu eftir okkum á gøtuni, og tapið kostaði eisini Josef Hickersberger starvið sum venjari. Men tað var samstundis okkara egna skuld, og tað noyddust vit at taka ábyrgdina av. Eisini hóast talan var um eina altjóða skomm, sigur Herzog.

Miðvallarin, sum tá var 22 ára gamal, spældi í Landskrona sín 21. av tilsamans 103 landsdystum. Men hvørki hann ella nakar av liðfeløgunum høvdu orkuna at koppa dystinum, eftir at Føroyar høvdu skorað.

- Aftan á 1-0 málið vóru vit fullkomuliga groggy, og eg haldi ikki, at vit veruliga skaptu nakrar møguleikar eftir hetta. Og onkursvegna kanst tú siga, at vit als ikki fataðu, hvat tað var, sum hendi.

Men hóast talan var um eina altjóða eyðmýking, sum Herzog ongan tíð fyrr ella seinni hevur upplivað, so dugir núverandi hjálparvenjarin kortini eisini at skemta eitt sindur um hendingina.

Saman við áleyparanum Peter Pacult skuldi Herzog nevnliga til doping-roynd eftir dystin, men tað helt hann sjálvur vera heldur óneyðugt.

- Vit spurdu UEFA-eftirlitsmannin, um hann var púrasta óður í høvdinum. Hvussu ólukkan kundi hann halda, at vit vóru dopaðir, soleiðis sum vit spældu!

- Júst tað er kanska nakað, sum eg kann flenna eftir í dag. Men tapið er framvegis nakað, sum nívur okkum, sum spældi við handan dystin, sigur Andreas Herzog.

# Eysturríki í bíðirøð hjá Jógvan Martini

**Tá føroyski landsliðsvenjarin í síðstu viku luttók á fundi fyri landsliðsvenjarar í Wien, var tað næstan eingin endi á, hvussu nógv fjølmiðlafólk úr Eysturríki vildu vita um føroyska landsliðið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í síðstu viku vóru landsliðsvenjarar stevndir saman til fundar í eysturríkska høvuðsstaðnum Wien. Europiska fótbóltssamgongan UEFA var vertur, og stevnan varð hildin í kjalarvørrinum av EM endaspælinum, sum fyrr í summar var í Eysturríki og Sveis.

Millum mongu luttakararnar var føroyski venjarin Jógvan Martin Olsen, sum leygardagin fyri seinastu ferð fer at hava ábyrgdina av landsliðnum á heimavølli.

Føroyski venjarin hevur fleiri ferðir áður luttikið í slíkum stevnum, sum eru á skránni annað hvørt ár, men hann hevur ongantíð kent sovornan útlendskan áhuga fyri føroyska landsliðnum, sum hann hesa ferð kendi tað frá pressuni í Eysturríki.

-Tað vóru nógv fjølmiðlafólk, sum vildu vita, hvussu tað stendur til á føroyska landsliðnum. Og um vit rokna við, at tað fer at bera til nú leygardagin at endurtaka tað, sum eysturríkarar minnast so væl kom fyri í Landskrona fyri átjan árum síðani, greiðir Jógvan Martin Olsen frá.

Á miðdegi í dag fóru venjarin og spælararnir undir fyrireikingarnar til stóru avbjóðingina, sum tað verður, tá ið Eysturríki seinnapartin leygardagin verður mótstøðuliðið.

Hvat svaraði tú eystur-